## Illir um veiðisteðg

Íslendski fiskimálaráðharrin, Einar K. Guðfinsson, gav í gjár lodnuskipunum boð um at gevast, tí lodnufiskiskapurin hevur verið vánaligur í vetur. Skipini hava loyvi at veiða 250.000 tons, men tey hava bara fiskað smá 40.000 tons, og fiskifrøðingarnir mæltu til veiðisteðg. Men fiskimenninir eru illir. Í gjár fekk okkurt skip 450 tons í einum kasti, og sambært stýrimanninum var nógv lodna at síggja har, men einki fiskirannsóknarskip.



## Átøk fyri børn og ung

Grønlendski landsstýrismaðurin í familju- og heilsumálum, Arkalo Abelsen, og danski ráðharrin í vælferðarmálum, Karen Jespersen, hava skrivað undir eina avtalu, sum skal tryggja børnum og ungum í Grønlandi betri umstøður. Millum annað er ætlanin at skipa eitt toymi við tveimum grønlendingum og tveimum dønum, sum arbeiða við børnum og ungum. Hetta verður gjørt í samsvari við eina avtalu, sum landsstýrið og stjórnin gjørdu longu í 2006.

# Gloyma at søkja um studning

**Nógvir útróðrarmenn fáa ikki tann studning, teir hava rætt til, tí teir gloyma at søkja**

ÚTRÓÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nógvir útróðrarmenn fáa ikki tann studning, teir hava rætt til.

Tað heldur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í Fiskivinnu- og tilfeingismálum.

Partamaður hansara, Páll á Reynatúgvu, hevur spurt hann, um hann er greiðir yvir, hvussu stórar trupulleikar, útróðrarmenn í Sandoy og kanska aðrastaðni við, hava av at fáa útróðrarfiskin fluttan til eina góðkenda landingarmiðstøð.

Hann vísti á, at tað hevði verið eitt stórt afturstig fyri útjaðaran, at Farmaleiðir vórðu einskildar og hann vildi hava at vita um nakrar ætlanir vóru um at bøta um støðuna.



*Nógva staðni í landinum forsøma útróðrarmenn at søkja um studning, sum teir hava rætt til, og nú Farmaleiðir vórðu einskildar, er trupulleikin bara vaksin. Landsstýrismaðurin í fiskivinnu-og tilfeingismálum, fer nú at taka málið upp*

*Savnsmynd*

Aðrir tinglimir vístu á, at tað eru útróðrarmenn víða hvar í útjaðaranum, sum hava sama trupulleika, sum teir í Sandoy.

Tórbjørn Jacobsen vísti á, at útróðrarmenn, har ongin uppboðssøla er, kunnu fáa 14 oyru fyri kilo í stuðuli til at flyta fisk, livur og rogn á eina góðkenda landingarmiðstøð.

Um hetta var nóg mikið skuldi hann lata vera ósagt.

Hinvegin vísti hann á, at, at tað var nógv, sum bendi á, at útróðrarmenn fingu ikki tann flutningsstuðul, teir høvdui rætt til av teirri einføldu orsøk, at teir søktu ikki um stuðulin.

Hann vísti á, at í 2007 vóru tilsamans 3,3 milliónir goldnar út í flutningsstuðuli.

Men av teimum vóru bara 40.000 krónur goldnar í stuðuli til útróðrarbátar, sum hava avreitt til uppboðssølu

- Tí er tað okkurt, sum bendir á, at útróðrarmenn í útjaðaranum gera ogvuliga lítið av at brúka tann møguleikan, teir hava at søkja um flutningsstuðul, sigur Tórbjørn Jacobsen.

- Annars vórðu 2,6 milliónir rindaðar í stuðuli at flyta fisk frá uppboðssølu til fiskavirki og frá fiskavirki til avskipingar vórðu goldnar 6000 krónur í flutningsstuðuli og frá fiskavirki til Høvdavirkið vórðu goldin 712.000 krónur í flutningsstuðuli.

Tórbjørn Jacobsen segði annars, at hann var sinnaður at taka alt málið upp aftur, tí politiska endamálið hevði verið at javntseta allar fiskivinnuna í ølum landinum, men tað var ikki støðan nú, og trupulleikin var vaksin síðani Farmeleiðis vórðu einskildar uttan at samskipa tað við flutningsstuðilin og uttan at tryggja útjaðaranum nøktandi flutning.

Kári P. Højgaard helt, at 14 oyru fyri kilo var alt av lítið.

- Tað eru piparnøtur, tí inni á meginøkinum kostar tað nógva staðni eina krónu fyri kilo at flyta fisk millum, so hjá útjaðaranum er tað helst nógv dýrari.

Fleiri politikarar vóru samdir um, at tað var ein trupulleiki, at Farmaleiðir og flutningur hoyrir undir landsstýrismanninum í innlendismálum, men flutningsstuðulin hoyrir undir landsstýrismanninumí fiskivinnumálum, men at teir báðir høvdu ikki samskipa nakað, tá ið Farmaleiðir vórðu einskildar og hendan manglandi samskipingin gjørdi, at brúkarar ov vinnugreinar duttu niður ímillum.

# Varta upp við krevjandi tónleiki

**Leygardagin hevur Føroya Symfoniorkestur konsert við kendum tónleiki, sum setir síni krøv til tónleikararnar**

KONSERT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Leygardagin klokkan 19.30 bjóðar Føroya Symfoniorkestur til konsert í Norðurlandahúsinum.

Á skránni eru trý verk, men tað eru verk, sum eru ein avbjóðing fyri tónleikararnar.

Fyrst á skránni er Keisarakonsertin, sum er ein av heilt stóru pianokonsertunum og tað er Jóannes Andreasen, sum spælir solo.

Tað nýtist ikki at siga so nógv um hann, tí hann er av okkara kendastu tónleikarum, sum eisini ferðast víða um at spæla.

- Men at læra seg eina konsert upp á 40 minuttir uttanat, setir sanniliga síni krøv og kostar nógvar venjingartímar, sigur Bernharður Wilkinson, sum stjórnar orkestrinum.

Á konsertini á Norðurlandahúsinum er eisini eitt sera vakurt stykki.

- Hetta er eitt stykki, sum nógv fólk bera kenslu á, uttan kanska at hava givið sær far um, hvar, tey hava hoyrt tað.

Men Bernharður Wilkinson heldur, at tað er ikki so løgið, at nógv fólk bera kenslu á hetta stykkið, eftir amerikanska tónaskaldið, Samuel Barber, tí tað er nógv spælt á heilt serligum høvum.

- Hetta stykkið hevur sett sín dám á mangar filmar, eitt nú á ein av allarkendastu krígsfilmunum, Platoon, umframt á filmar sum Elephant Man og Lorenzos Oil. Men stykkið var eisini spælt á jarðarferðini hjá amerikanskum forsetunum Roosewelt og Kennedy og á jarðarferðini hjá Dianu prinsessu. Og eftir tiltkikna 11. september, var tað hetta stykkið, sum varð mest spælt.

- Hetta er eitt stykki, sum vekir sterkjar kenslur um miss og sakn, sigur dirigenturin.

Triðja stykkið á skránni er av heilt øðrum slag, tí tað er Enigma Variations eftir Edward Elgar.

Tað er eitt stykkið í mongum satsum, sum hann hevur ognað konuni, vinkonuni, hundinum og so framvegis.

- Hetta er eitt ógvulgia krevjandi stykki og helst tað mest avbjóðandi stykkið, sum Symfoniorkestrið hevur givið seg í kast við og eg gleði meg til at fara í holt við tað, sigur Bernharður Wilkinson.

Atgongumerkið kostar 150 krónur og tey fáast í Norðurlandahúsinum og í Kunningarstovuni í Havn.

## Ongin ókeypis koyring

Samgongan hevur fyribils ongar ætlanir um at ganga í fótasporunum Tórshavnar Býráð og at gera tað ókeypis at koyra við Bygdaleiðum.

Tað sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í løgmálum.

Tað var Páll á Reynatúgvu, løgtingsmaður, sum í Løgtinginum í gjár staðfesti, at Tórshavnar Býráð hevur ásannað, hvussu stóran týdning, almenna ferðslan hevur og tí er tað nú blivið ókeypis at koyra við Bussleiðini í Havn, samstundis sum at hon hevur økt um koyringina og er farin at koyra tríggjar ferðir um tíman.

Hetta er eisini ein umhvørvisspurningur, helt hann.

Hann vildi tí hava at vita um nøkur ætlan er um at gera tað ókeypis at koyra við Bygdaleiðum og at økja um túratalið.

Men tað er tað ikki, staðfesti Helena Dam á Neystabø. Hon segði eisini, at tað stendur onki í samgonguskjalinum um ókeypis koyring við Bygdaleiðum og fyribils er hetta ikki ein spurningur, sum liggur í arbeiðsætlanini hjá samgonguni.

Annars skal ein nevnd setast at endurskoða fíggingina av øllum samferðslukervinum í landinum, sum tað er, við atliti at samfelagsbúskap, økismenning, umhvørvi og samhaldsfasta fígging.

-áki-